Høgni Hoydal:

# ABC-SAMGONGAN HEVUR FØRT LANDIÐ Í KREPPU

ANNAR HELDUR, AT POLITIKKURIN HJÁ **ABC-SAMGONGUNI** ER ORSØKIN TIL STÓRA UNDIRSKOTIÐ Á KOMANDI FÍGGJARLÓG. HIN HELDUR, AT NÚ RINDA VIT ROKNINGINA FYRI **FULLVELDISPOLITIKKIN** FRÁ 1998 TIL 2004.





SAMRØÐA
Heini í Skorini
heini_skorini@yahoo.com

**Frá 1998 til 2004 var skipað fullveldi ovast á dagsskránni, men síðani 2004 er loysingin at kalla horvin, og seinasta veljarakanningin gav Sambandsflokkinum størsta undirtøku. Um tit fara í fuglaperspektiv eina løtu, hvat er so hent seinastu tíggju árini?**

**Høgni**: Eftir kreppuna fyrst í nítiárunum tók ein nýggj sjálvstýrisrørsla seg upp, sum var grundað á ta sannføring, at tíðin var komin til at taka fulla ábyrgd av okkara egna samfelagi. Kreppan vísti, at ríkisfelagsskapur og heimastýri ikki er nøkur trygd fyri føroyskari vælferð, og eftir valið í 1998 var fyri fyrstu ferð nakrantíð ein meiriluti á tingi fyri skipaðum fullveldi sum beinleiðis máli.

**Men hví eydnaðist tað ikki?**

**Høgni**: Tí við einum so smølum meiriluta høvdu vit eina ov veika samráðingarstøðu, og Fólkaflokkurin leyp frá lyftinum um fólkaatkvøðu í evsta tíma. Tá samráðingarnar slitnaðu, umløgdu vit okkara strategi og søgdu, at tað, sum vit ikki kunnu semjast um við danir, mugu vit taka sjálvi. So skóru vit blokkin við 366 milliónum, yvirtóku málsøkir og gjørdu klárt til at taka fulla ábyrgd av samfelagnum. Síðani 2004 hevur ABC-samgongan parkerað sjálvstýrisspurningin og allar sosialar og búskaparligar reformar. Við CHE-samgonguskjalinum fingu vit so blokkniðurskurð og yvirtøkur aftur á breddan, men beint áðrenn vit skuldu yvirtaka serforsorgina og skerja 117 milliónir av blokkinum, uppfann Jóannes Eidesgaard ta sonevndu lásagøluna, og Javnaðarflokkurin leyp frá. Tá avtornaði høvdu vit trýst Javnaðarflokkin longri, enn baklandið toldi, og flokkurin slapp sær úr samgonguni.

**Edmund**: Tann ríkisrættarligi spurningurin er eitt yvir hundrað ára gamalt mál, og seinastu øldina hevur pendulið sveiggjað aftur og fram millum samband og loysing. Tá Føroyar fóru á húsagang fyrst í nítiárunum og danir bjargaðu okkum við at pumpa tríggjar milliardir inn í føroyska bankakervið, sveiggjaði pendulið aftur ímóti loysingini, tí danir fingu skuldina fyri kreppuna, hóast øll í dag vita, at føroyingar høvdu alla ábyrgdina. Meðan eg var løgmaður frá 1994 til 1998, fluttu vit samfelagið frá einum undirskoti á eina hálva milliard til eitt yvirskot á eina hálva milliard. Frá 1998 setti fullveldissamgongan skipaða loysing ovast á breddan, men tað bar ikki á mál hjá teimum, og nú hevur sambandshugsjónin aftur undanvind.

**Hví tað?**

**Edmund**: Tí at fólk síggja, at loysingarmodellið ikki er haldgott og søkja heldur tann tryggleikan, sum sambandið stendur fyri. Tann íslendska fyrimyndin hjá loysingarvonginum er horvin, nú Ísland er vorðið eitt ørmundarhús, sum má hava hjálp frá IMF fyri at yvirliva. At føroysku bankarnir fingu lut í bankapakka I og II hjá donsku stjórnini vísir eisini, hvussu týdningarmikið tað er at vera partur av einum størri bankakervi, so íslendska marran ikki endurtekur seg í Føroyum. Eftir kreppuna í nítiárunum mistu nógvir føroyingar álitið á danska bankakervið, men nú hendir tað øvugta. Nú eru donsku bankapakkarnir sjálv bjargingin.

**Høgni**: Um nakar hevur førkað sveiggið ímóti sambandshugsjónini, so eru tað ABC-flokkarnir sjálvir. Vit rindaðu sjálvi fyri alla kreppuna, men kortini byggir sambandið framvegis á ta følsku myndina, at onnur bjargaðu okkum úr trupulleikunum. Fullveldislandsstýrið spardi tríggjar milliardir upp og rindaði alla skuldina frá 1998 til 2004, sum var á sjey milliardum, tá vit tóku við. Landið fekk 1,6 milliardir fyri Føroya Banka,